# Áðrenn Montreal

**Kanadiska koyringin á Gilles Villeneuve Circuit í Montreal**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Michael Schumacher hevur sjey ferðir seinastu 11 árini vunnið á Gilles Villeneuve Circuit í Montreal. Breytin hevur verið sera væl egnað til Ferrari, og eingin ivi er um, at bæði Ferrari og Michael Schumacher eru svangir eftir einum sigri. Men hvørki Schumacher ella Ferrari teljast millum bestu boðini uppá vinnarar í kanadisku koyringini í ár.

Renault er langt á odda í bæði kappingini um meistaraheitið fyri lið, og koyrarar. Men er seinastu koyringarnar sett so dyggiliga upp á pláss, av McLaren bilinum hjá Kimi Räikkönen. Hevði Räikkönen fingið bilin um málstrikuna, so hevði hann vunnið á Nürburgring.

Men eisini BMW/Williams og Toyota hava skjótar bilar og koyrarar. Eingin ivi er um, at hetta er ein spennandi koyring.

## Um kanadisku koyringina á Gilles Villeneuve Circuit í Montreal

**Umferðir:** 70
**Breytarlongd:** 4,312 km
**Skjótast umferð:** Rubens Barrichello(Ferrari), 1 m 13,622 s
**Longdin á koyringini:** 305.270
**Núverandi koyrarar sum hava vunnið á Nürburgring:** Michael Schumacher 1994(Benetton)1997, 1998, 2000, 2002, 2003, 2004(Ferrari) - Ralf Schumacher 2001 (Williams)

*Kelda www.f1.com*

# Villenevue á veg úr formel 1

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Koyrir Jaques Villeneuve sína seinastu formel 1 koyring á Gilles Villeneuve breytini hetta vikuskiftið?

Spurningurin gerst alt meira átroðkandi fyri fyrrverandi heimsmeistaran og kanadiumannin. Í vikuni segði, stjórin hjá Jaques Villeneuve, Peter Sauber tað, sum øll hava hugsa, Jaques koyrir ov spakuliga, og tað mugu vit finna eina loysn á. Hann segði, at loysnina mátti liðið finna innanhýsis, og hetta gevur Jaques eina vón um, at hann kanska sleppur at halda fram, um hann klárar seg væl í Kanada.

Breytin, sum er uppkallað eftir heimsgitna formel 1 koyraranum Gilles Villeneuve, hevur ongantíð verið serliga góð við sonin Jaques, Øðiliga ofta hevur yngri Villeneuve koyrt út av ella steðga upp. Alt meðan landsmennirnir hjá Jaques Villeneuve eru vorðnir alt meira ótolnir. Tí er hetta sanniliga ringar umstøður at koyra sína lagnukoyring undir.

Á tíðindafundinum í Kanada hósdagin vildi Jaques Villeneuve ikki tosa um kritikkin frá Peter Sauber, hann segði, at sovorðin mál eiga at verða umrødd innanhýsis og ikki í fjølmiðlunum. At kritisera hvønn annan í fjølmiðl-unum vísir veikleika í liðnum, segði Villeneuve. Spurningurin er so, um hetta ikki eisini var kritikkur av hvør øðrum í fjølmiðlunum.

Sauber liðið skuffar illa í ár, liðið hevur Ferrari motorar, Michelin dekk og ein heimsmeistara handan róðrið, og hetta átti at verið eitt vinnandi samstarv. Men ístaðin gongur av skriðini til. Hetta kemst fyrst og fremst av manglandi fígging. Liðið misti høvuðsstuðulin Red Bull, áðrenn hetta kappingarárið byrjaði. Tí er trupult at fáa endarnar at røkka saman.

Næsta ár fer Sauber neyvan at brúka Ferrari motorar. Hesir eru sambært Peter Sauber ov dýrir, og liðið hevur møguleika fyri at fáa BMW motorar bíligari næsta ár. Í formel 1 væntar man, at BMW keypir antin liðið ella partar av liðnum næsta kappingarár, og at hetta verður høvuðsliðið hjá BMW í 2006.

Men tað er nokk heldur ivasamt, um Jaques Villeneuve verður koyrari hjá Sauber/BMW. Nýggjastu leysasøgurnar í formel 1 siga, at Vitantonio Liuzzi, sum hevur koyrt nakrar koyringar fyri Red Bull í ár, verður lántur til Sauber, at avloysa Jaques Villeneuve, tá hesin í næstum verður koyrdur. Men hetta er, sum sagt leysasøgur.

# BAR Honda í kreppu?

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

BAR-Honda vóru sera skuffandi á Nürburgring, eftir at hava royndarkoyrt í ein heilan mánaða uttan nakra koyring, vísti liðið seg, sum verandi lítið kappingarført. Tað gjørdist ikki til annað enn 10. og 12. pláss til koyrararnar Jenson Button og Takuma Sato. Hetta var nógv verri enn vænta, og als ikki í lagi fyri eitt lið, sum hevur eina av teimum størstu fíggjarætlanunum í formel 1.

BAR er nú komið næstan hálvan veg í gjøgnum kappingarárið, og hava ikki eitt einasta stig. Stjørnukoyrarin hjá liðnum, bretin Jenson Button, harmast óiva sera nógv um, at hann ikki slapp at skifta til BMW/Williams, sum ætlanin var áðrenn hetta kappingarárið. Williams hevur ein kappingarføran bil, og hevur bilar við í top 3 næsta hvørja koyring.

Hetta vikuskiftið hevur BAR ein fyrimun framum fleiri av hinum liðunum. Reglugerðin í ár krevur at koyrt verður við somu motorum tvær koyringar, BAR høvdu gamlar motorar seinast, og fáa tí nýggjar hesuferð, hetta er eisini galdandi fyri Sauber bilarnar og Minardi bilin hjá Christian Albers. Koyrararnir sum steðgaðu upp ella koyrdu útav: Mark Webber, Ralf Schumacher og Kimi Raikonnen fáa somuleiðis nýggjan motor.

Nýggju motorarnir eru meira álítandi og skuldu krafta betur enn teir gomlu motorarnar, sum hava koyrt yvir 500 km.

## formuladeildin

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 11 | 7 - 1 - 3 | 29 | 14 | 15 | 22 |
| 2 B36 | 11 | 6 - 4 - 1 | 16 | 5 | 11 | 22 |
| 3 Skála | 11 | 5 - 4 - 2 | 23 | 15 | 8 | 19 |
| 4 NSÍ | 11 | 4 - 4 - 3 | 16 | 14 | 2 | 16 |
| 5 EB/Streymur | 11 | 4 - 4 - 3 | 12 | 16 | -4 | 16 |
| 6 KÍ | 11 | 4 - 2 - 5 | 19 | 15 | 4 | 14 |
| 7 TB | 11 | 3 - 3 - 5 | 12 | 18 | -6 | 12 |
| 8 ÍF | 11 | 3 - 3 - 5 | 14 | 26 | -12 | 12 |
| 9 GÍ | 11 | 3 - 1 - 7 | 15 | 20 | -5 | 10 |
| 10 VB | 11 | 2 - 2 - 7 | 6 | 19 | -13 | 8 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 5 | 5 - 0 - 0 | 25 | 2 | 23 | 15 |
| 2 FSV04 | 5 | 4 - 0 - 1 | 13 | 2 | 11 | 12 |
| 3 B71 | 5 | 4 - 0 - 1 | 15 | 5 | 10 | 12 |
| 4 LÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 24 | 12 | 12 | 9 |
| 5 AB | 5 | 2 - 1 - 2 | 9 | 11 | -2 | 7 |
| 6 HB | 5 | 2 - 0 - 3 | 13 | 13 | 0 | 6 |
| 7 Royn | 5 | 2 - 0 - 3 | 4 | 23 | -19 | 6 |
| 8 Sumba | 5 | 1 - 0 - 4 | 14 | 24 | -10 | 3 |
| 9 B36 | 5 | 0 - 2 - 3 | 5 | 11 | -6 | 2 |
| 10 GÍ | 5 | 0 - 1 - 4 | 6 | 25 | -19 | 1 |

# Soleiðis hevur gingist

| | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NSÍ-TB | 1-1 | - | - | 5-1 | - | - | - | 1-0 | - | - | 2-3 | 2-1-1 | 9-5 |
| VB-B36 | 0-3 | 1-1 | 0-0 | 2-1 | 2-1 | 1-0 | 0-0 | 1-1 | 1-2 | 1-3 | 1-2 | 3-4-4 | 10-14 |
| ÍF-Skála | 0-0 | 1-4 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-1-1 | 1-4 |
| KÍ-GÍ | - | 1-1 | 1-0 | 5-1 | 1-2 | 2-1 | 0-0 | 4-2 | 4-5 | 1-0 | 1-6 | 5-2-3 | 20-18 |
| HB-EB/S | 4-0 | 3-0 | 5-0 | 2-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 5-0-0 | 15-0 |

*Hagtøl kunnu ofta vera stuttlig at taka til, tá metast skal um møguleikar hjá ymsu liðunum. Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini.*